## Lítið av toski og hýsu

Kanningar hjá íslendska havrannsóknarstovninum benda á, at toskaárgangurin í ár er veikur, og at hýsuárgangurin er langt niðan fyri meðal. Tað er fyribilsniðurstøðan aftan á stovnskanningar á Vesturlandinum og Norðurlandinum, skrivar Morgunblaðið. Samstundis leigaði rannsóknarstovnurin eitt skip at kanna, hvuvvu rækjustovnurin er fyri. Sambært Morgunblaðnum var lítið av rækju at fáa, men fiskifrøðingarnir mæla kortini politikarunum til at loyva rækjuveiði í vetur, skrivar blaðið.



## Laksamet í oktober

Í oktober útfluttu norðmenn laks og úrdráttir úr laksi fyri 2,2 milliardir norskar krónur, og tað er tann besti mánaðurin nakrantíð, skrivar NTB. Samanborið við sama mánað í fjør var virðið 479 milliónir krónur ella 28 prosent størri. Tað skal tó sigast, at nøgdin var eisini nógv størri í ár. Í síðsta mánað fóru 83.536 tons av laksi av landinum, og tað var 16.000 tons ella 24 prosent meiri enn í oktober í fjør. Paul Aandahl í útflutningsnevndini sigur við NTB, at tølini fyri oktober vísa, at eftirspurningurin eftir norskum laksi veksur støðugt.



# Eiga at fáa føroyska filmsjáttan

*Tað kann fáa ómetaliga stóran týdning fyri føroyska framleiðslu, um vit fáa atgongd til at søkja pening úr Statens Filmsfond. Her er tað mynd úr filmi hjá Sakaris Stóra*

*Mynd: http://birkblog.blogspot.com/*

**Hóast uppskot er frammi um at Føroyar og Grønland fáa atgongd til pening úr danska Statens Filmsfond, heldur Høgni Hoydal at vit eiga at faa okkara egnu filmsjáttan fyrst**

FILMSFÍGGING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Tað var í kjalavørrinum á frumsýningini av fyrsta grønlendska spælifilminum sunnukvøldið, at spurningurin um fígging av føroyskum og grønlendskum filmum aftur kom á dagskrá. Verður tað til Juliane Henningsen verður hetta nevniliga seinastu ferð ein grønlendsk ella føroysk filmsframleiðsla er avskorðin frá at søkja pening úr danska Statens Filmsfond.

### Fyrst føroyska pening

Longu í maj í fjør reisti Juliane Henningsen spurningin á Fólkatingi um tað órimiliga í, at danska filmslógin ikki er galdandi fyri Grønland og Danmark, og heitti hon á táverandi danska mentamálaráðharran um at fáa londini við í lógina, tá hendan skal endurskoðast í 2010. Og hon hevur á ongan hátt slept málinum

- Eg haldi tað hevði verið frálíkt, um Danmark kundi tryggjað at føroyskir og grønlendskir filmsframleiðarar fáa somu atgongd til filmspengarnar, sigur Juliane Henningsen við grønlendska blaðið Sermitsiaq og ferð hon nú at heita á núverandi danska mentamálaráðharran um at taka hennara ynski upp aftur.

Fyribils hevur sosialdemokratiski framsøgumaðurin í mentamálum sagt, Mogens Jensen, at hann fegin vil vera við til at geva føroyskum og grønlendskum filmsfólkum sama møguleika at søkja pening sum teirra donsku starvsfelagar.

- Vit vilja fegin arbeiða fyri at broyta filmslógina, og eg havi ilt við at ímynda mær at uppskotið ikki fær breiða undirtøku, sigur hann.

Sambært Høgna Hoydal hevur onki beinleiðis kjak verið í Norðuratlansbólkinum um spurningin og hann tekur heldur ikki treytalyst undir við ynskinum hjá Henningsen.

- Eg taki ikki undir við, at vit á handan hátt royna at skumpa ábyrgdina av føroyskum mentanarpolitikki yvir á donsku stjórnina, sigur Høgni Hoydal, sum tó ikki fer at seta seg ímóti uppskotinum hjá Henningsen.

- Men tað skal í øllum førum vera treytað av, at vit eisini her í Føroyum seta pening av til føroyska filmsframleiðslu, sigur Høgni Hoydal.

### Ongin trygd

Hesum er Jákup Veyhe, stjóri á Klippfisk, samdur í. Hóast tað kann fáa ómetaliga stóran týdning fyri føroyska filmsframleiðslu um vit fáa møguleika at søkja pengar úr Statens Filmsfond, má hetta ikki setast í staðin fyri eina føroyska filmsjáttan, sigur hann

- Tað verða sett rættiliga stór krøv til eina filmsverkætlan, áðrenn man kan gera sær vónir um at fáa stuðul úr Statens Filmsfond. Tí er møguleikin at søkja ikki nøkur trygd yvirhøvur, sigur Jákup Veyhe.

Hann vísir á, at niðurlagið í føroyskari filmsframleiðslu altíð hevur verið, at vit onki hava at vísa á. Tí heldur hann tað vera sera umráðandi, at vit fyrst fáa eina fasta føroyska filmsjáttan, sum kann tryggja ein kontinuitet í framleiðsluni av føroyskum filmum.

- Aðrastaðni brúka tey milliónir uppá bara fyrireikingararbeiði, áðrenn spurningurin um fígging av sjálvari filmsframleiðsluni kemur uppá tal. Og tað er eisini har, við tí fyrireikandi fíggingini vit mugu byrja í Føroyum, minnir Jákup Veyhe, sum vónar at fáa eitt kjak í lag við føroyskar politikarar um spurningin.

Í einum slíkum kjaki kann útlitið til atgongd til Statens Filmsfond sjálvandi blíva enn ein uppløgd grundgeving fyri, hví tað eisini er so umráðandi at føroyskur peningur eisini kemur upp í leikin, heldur Jákup Veyhe.



## Skjaldratingsboð

*Carl Jóhan Jensen*

Fríggjadagin 6. november í hesum Harrans ári tjúguhundrað og níggju og endaleyst frameftir (ið hvussu er hetta til jóla) stevnir skaldið ella ó-skaldið Carl Jóhan Jensen gomlum og ógomlum, lágum og ólágum, vitandi og óvitandi, samdum og ósamdum, beistaktigum og óbeistaktigum, valdum og óvaldum, útisettum og óútisettum, krímfongdum og ókrímfongdum, skattaðum og óskattaðum, lýstum og ólýstum, javnaðum og ójavnaðum, heilagum og óheilagum, sambandskum og ósambandskum, lesandi og ólesandi, fúlum og ófúlum, ja, stutt sagt øllum yvirmoldarføroyingum á skjaldrating.

Skjaldratingið verður hildið undir heitinum *Fótatraðk – ein skjaldratingsseta*. Fylgiskjølini eru 89 í tali, umframt eina fløgu við viðmerkingum og upplestri.

Forvitin spyr

-Íðan, hvat tr**** er so eitt skjaldrating?

Jú, tað er eitt ting, har skjaldur verða løgd fram.

-Men hvørji skjaldur?

Nýskjaldur sjálvandi.

-Og hvat slag av skjaldrum eru tað so, meðni?

Nei, tað eru nú bara skjaldur við støði í teimum gomlu, hevdbundnu skjaldrunum, men ólík, stak ólík til innihald kortini. Ella skjótt samanumtikið, skjaldur við nútíðarligum evni, skammleyst politisk, full av misskiltum tjóðskapi, óheimastýrislig, óflættilig, forherðað, óskattborgarasleiskin, pásettlig, ósemjusøkjandi, hartil ólurtaravinarlig, óvælferðarsjabbslig, men fram um alt so ómorgunandaktslig, so óhvørkisliga orðað, at eingin ófanansettur føroyingur átti at lænt teimum oyra. So óreint í tykkum, sum sanniliga og við vissu at kalla, lokkaði av forvitni tykkara, fara at keypa hesi skjaldur, lesa tey og lurta eftir teimum, skammleys eru tit og ó-í-oyggjumhavandi bæði her og handan, nú sum í allar ævir.

Tað eru forlagið Sprotin og plátufelagið Tutl, sum enn og aftur útvega syndini og ósómanum pappír, prent og fløgurúmd og skamm fái tey við fyri tað.